# Tunnils-arbeiðið gongur eftir ætlan



*Arbeiðið upp á at gera tilkoyringina til Vágatunnilin gongur eftir ætlan. Í Leynum eru teir í gongd við at gera brúnna*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Arbeiðið upp á at gera Vágatunnilin lidnan gongur eftir ætlan. Tíðarætlanin sigur, at liðugt verður í februar næsta ár, men tað verður ikki drigið út, um tað vísir seg, at arbeiðið kann verða liðugt fyrr, lovar stjórin**

TUNNILSGERÐ
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Undirsjóvartunnilin undir Vestmannasundi verður liðugur í februar komandi ár. Sigur tíðarætlanin. Men stjórin sigur, at verður møguligt at gera tað fyrr, verður arbeiðið ikki drigið út.

Arbeiðið, sum eftir er at gera, gongur eftir ætlan. Byrjað er at taka vegbreytina inni í tunlinum upp og leggja nýggja aftur ístaðin. samstundis verða rør og frárensl gjørd, og tað arbeiðið verður væntandi liðugt fyrstu viku í mai, sigur Dávid Reinert Hansen, stjóri í partafelagnum Vágatunlinum. Tá tað er gjørt, skulu eini tvey løg av asfalti leggjast omaná.

### Tekja tunnilin

Tetting og trygging av loftinum eru liðug, men eftir er at tekja tunnilin í støðum, har eitt sindur dryppar enn, sigur stjórin.

Tað arbeiðið fer at verða gjørt samstundis sum annað arbeiðið, eitt nú el- og kaðalarbeiðið, sum gerast skal inni í tunlinum.

El-arbeiðið er boðið út, sigur Dávid Reinert Hansen, og tilboðini skulu vera inni fyrst í apríl.

Tilkoyringarnar til tunnilin báðu megin verða nú eisini gjørdar lidnar. Leynamegin eru teir farnir undir brúnna. Stovnarnir verða stoyptir. Syðru megin eru teir um at vera lidnir, og síðan verður farið norður um ánna. Rundkoyringin verður eisini gjørd liðug, men ikki tikin endaliga í brúk, fyrr enn tunnilin verður latin upp, sigur stjórin.

Vágamegin verður farið undir at gera tilkoyringina lidna fyrst í apríl. Serliga er tað stóra svingið norðanvert Fútaklett, sum gerast skal liðugt. Tilfar liggur uttan fyri tunnilsmunnan, og nakað verður eisini skilt úr tunlinum, nú vegbreytin verður tikin upp og løgd av nýggjum. Eitt sindur verður helst tikið úr grótbrotinum í Sandavági, men ferðslan har verður verri enn so tann sama, sum var, meðan borað varð.

### Norðoyatunnilin

Tá spurt verður eftir Norðoyatunlinum, svarar Dávid Reinert Hansen, at nú má hann fyrst fara at skifta kaskett. Hann er eisini stjóri í tí felagnum, sum skal standa fyri Norðoyatunlinum.

Arbeiðið við Norðoyatunlinum gongur sína gongd,sigur Dávid Reinert Hansen.

Forprojektið, sum skal vera grundarlag fyri góðkenning til at fara undir veruliga arbeiðið, verður væntandi liðugt í juni í ár, sigur hann.

Síðan kann farast undir detailprojektering, sum væntandi fer at vara árið út.

– Gongur væl, kann útbjóðingin helst verða í seinast ársfjórðingi í ár, sum eisini hevur verið ætlanin, sigur Dávid Reinert Hansen, stjóri fyri Norðoyatunnilin.

Tað vil so siga, at byrjast kann í fyrsta lagi fyrst í komandi ári upp á sjálvt arbeiðið at gera Norðoyatunnilin, sigur hann.

# Eingi veðurtíðindi eftir fyrsta apríl

**Eftir fyrsta arpíl fara føroyingar ikki at hoyra í Útvarpinum, hvussu veðrið er á flogvøllinum í Vágum**

VEÐURTÍÐINDI
*Edvard Joensen*

**Flogvøllurin**: Tá veðurstøðirnar verða lisnar í Útvarpinum eftir páskir, verður flogvøllurin ikki at hoyra millum støðini, sum hava lot av landnyrðingi við ongum avfalli og góðum sýni.

Veðrið fer tó at vera tað sama, eisini á flogvøllinum, men Danmarks Meteorologiske Institut, DMI, sum hevur goldið fyri mátingarnar á flogvøllinum, gevst nú við hesum gjaldi, og so verða ongar mátingar gjørdar, sigur Finnbogi Niclasen, flogvallarovasti í Vágum.

Ikki tí at tað hevur nakran praktiskan týdning sum so, sigur hann, men hetta hevur verið ein tænasta, sum fólk hava vant seg við. So hava tey sitið og lurtað eftir Útvarpinum og sammett við aðrar støðir, hvussu veðrið nú er kring landið.

Onkur, sum ætlaði sær at flúgva, hevði tað eisini sum málistokk fyri, hvussu bangin ein skuldi vera ella ikki.

Hinvegin verður veðrið kortini kannað relguliga bæði á og rundan um flogvøllin.

Í hesum døgum verður ein vindradari royndarkoyrdur í økinum. Hann skal kanna og siga frá, hvussu vindviðurskiftini í umráðnum eru, soleiðis at flogleiðslan kann leiða ferðsluna soleiðis, sum líkindini eru best til.

Tær kanningarnar fara helst at halda fram eina tíð enn, sigur Finnbogi Niclasen, tí enn eru ikki allir møguleikar royndir.

– Tað er nú so við slíkum, at tað er, sum vindurin blæsur. Og enn hava ikki allar ættir blást kring flogvøllin, síðan radarin varð settur upp, sigur hann.



*Hóast veðurmátingarnar hjá DMI halda uppat fyrsta apríl, fer veðrið á flogvøllinum enn sum áður at vera skiftandi*

*Mynd: Edvard Joensen*



# Bæði reiðarar og fiskimenn vilja hava mest møguligt fyri fiskin

**– Í sínari tíð vórðu ávísir reiðarar lagdir undir at gera, sum teimum lysti – ja, snøgt sagt at snýta og bedraga fiskimenninar. Men hetta er ikki hugburðurin í dag. Reiðarar og fiskimenn hava júst somu áhugamál, og tað er at fáa mest møguligt fyri fiskin, sigur formaðurin í Føroya Reiðarafelag**



*– Reiðarar og fiskimenn hava fullkomiliga samanfallandi áhugamál; tað er at fáa mest møguligt fyri fiskin. Her er eingin tvídráttur og einki mistonkiligt millum partarnar. Reiðarafelagið liggur heldur ikki í stríði við fiskimannafelagið um fiskaprísirnar, sigur Jákup Sólstein, formaður í Føroya Reiðarafelag*

Í grein í Sosialinum í vikuni mælti ein kelda í fiskivinnuni ímóti uppskotinum um avtøku av 30% regluni um sølu av fiski um uppboðssøluna.

– Verður tað soleiðis, at reiðarin púra einsamallur kann gera av, hvar veiðan verður seld, er vandi fyri, at vit koma aftur í tíðina, tá ið virki og skip hingu saman, og eingin kapping var um fiskaprísin, segði keldan.

Keldan helt, at tað, sum kann henda, er at reiðarar taka seg saman í sonevnd kartell, har teir púra einsamallir gera av, hvar fiskurin verður seldur, og hvør prísurin skal vera.

### Ikki samdur

Í samband við nevndu grein í Sosialinum, royndi blaðið at fáa eina viðmerking frá formanninum í Føroya Reiðarafelag, Jákupi Sólstein, men hann var ikki at hitta hendan dagin.

Hósdagin høvdu vit so Jákup í telefonini, og hann er ikki samdur við teimum, sum stúra fyri, at vit aftur eru á veg til gomlu skipanina, har seljari og keypari einsamallir avgera fiskaprísin.

– Í sínari tíð vórðu ávísir reiðarar lagdir undir at gera, sum teimum lysti – ja, snøgt sagt at snýta og bedraga fiskimenninar. Men soleiðis er tað ikki í dag. Reiðarar og fiskimenn hava júst somu áhugamál, og tað er at fáa mest møguligt fyri fiskin – hvar hann so enn verður seldur. Sáttmálin avger, hvussu býtast skal. Fær reiðarin nógv burtur úr eini sølu, so fær fiskimaðurin eisini nógv burtur úr – og øvut, tá ið minni kemur burtur úr. Ein og hvør reiðari og ein og hvør fiskimaður vil hava mest møguligt burtur úr hvørji einstakari fiskalast. Tað sigur seg sjálvt.

### Stúrir ikki

Jákup ber ikki ótta fyri, at keyparar fara at fremja nakra samansvørjing, um 30% reglan verður avtikin.

– Eg stúri ikki fyri, at tey samtøk um sølu av fiski, sum vit higartil hava hoyrt um, fara at føra okkum aftur í gomlu skipanina. Heldur fara hesi við eini meira skipaðari sølu at lætta um trýstið á útboðnum, so fiskaprísirnir her heima fara at halda sær uppaftur betur.

Formaðurin í reiðarafelagnum sigur, at øll viðurskifti um sølu av fiski eru opin millum reiðarar og fiskimenn.

– Her er einki dult, og báðir partar hava fullkomiliga samanfallandi áhugamál, sum er at fáa mest møguligt fyri fiskin. Her er eingin tvídráttur og einki mistonkiligt millum partarnar. Reiðarafelagið liggur heldur ikki í stríði við fiskimannafelagið um fiskaprísirnar, sigur hann.

### Ein katastrofa

Jákup Sólstein heldur annars, at tað, sum er hent á toskamarknaðinum seinastu tíðina, er ein katastrofa.

– Eg trúgvi, at treki saltfiskamarknaðurin er høvuðsorsøkin til støðuna.

Formaðurin í reiðarafelagnum vísir á, at prísirnir á toski eru falnir støðugt síðan í desember, og niðurgongdin hevur bara staðið við og er versnað.

– Eg vil meta, at miðalprísurin á toski er fallin einar 8-10 krónur, síðan hann var bestur í fjør vár, sigur Jákup Sólstein.

Toskaprísurin í Føroyum:

# 5-6 krónur lægri enn í Danmark og Bretlandi

*Vilmund Jacobsen*

Tað er ikki av ongum, at reiðarar og fiskimenn grenja um, at toskaprísurin í Føroyum er lágur, tí tað er hann veruliga.

Í aðrari grein í blaðnum í dag, sigur formaðurin í Føroya Reiðarafelag, Jákup Sólstein, at miðalprísurin á toski í dag er 8-10 krónur lægri, enn hann var, tá ið hann var bestur fyri einum ári síðan.

### 5-6 kr. á muni

Sosialurin hevur spurt seg fyri hjá nýggja fiskasølufelagnum, Fofish í Saltangará, um prísirnar á toski í Danmark og Bretlandi.

Abraham við Løkin sigur, at miðalprísurin á toski í Hull og Grimsby í løtuni liggur um 17,50-18 krónur fyri kilo, og tá er prísurin lágur í Bretlandi.

Spurdur, hvussu prísleg-an er í Danmark, vísir hann á, at skuldi Fofish sent feskan tosk niður á danska marknaðin beint nú, høvdu teir helst fingið einar 16-17 krónur fyri kilo.

– Fáa vit fáa 11-12 krónur í miðal fyri kilo av toski her heima, kunnu vit ikki vera annað enn nøgdir, soleiðis sum príslegan er á føroyska marknaðinum í løtuni, sigur Abraham við Løkin.

### Tolir lítið

Stutt kann sigast, at prísmunurin millum toskin á marknaðinum í Føroyum øðrumegin og í Bretlandi og Danmark hinimegin er 5-6 krónur.

Abraham við Løkin vísir á, at meðan føroyski marknaðurin er lutfalsliga lítil og skjótur at metta, tá ið nógvur fiskur kemur uppá land, er bretski og danski marknaðurin nógv størri og tolir tískil meira.

– Talið av keyparunum í Føroyum er avmarkað, meðan tað altíð er onkur, ið kann keypa fiskin á útlendska marknaðinum fyri ein líkinda prís – í hvussu er, soleiðis sum støðan er beint nú, sigur hann.

-Gó ir brúktir frá
REYNI SERVICE

TOYOTA CAMRY 2,2 AUTOM. Skrás.: 07-04-98 Km.: 82.000 Prísur: 182.600,- Garanti*
TOYOTA CARINA 1,6 SED. Skrás.: 20-12-95 Km.: 103.000 Prísur: 86.600,- Garanti* (Sýnaður 09-01)
TOYOTA AVENSIS 2,0 SOL STW. TDI Skrás.: 03-09-99 Km.: 157.000 Prísur: 158.600,- Garanti*
TOYOTA COROLLA 1,4 TERRA Skrás.: 18-04-01 Km.: 7.000 Prísur: 136.600,- Garanti**
TOYOTA AVENSIS 1,8 SOL Skrás.: 10-03-99 Km.: 46.000 Prísur: 148.600,- Garanti*
TOYOTA COROLLA 1,3 STATION Skrás.: 14-07-95 Km.: 120.000 Prísur: 79.600,- Garanti* (Sýnaður 04-01)
TOYOTA AVENSIS 2,0 TDI Skrás.: 25-10-99 Km.: 50.000 Prísur: 160.600,- Garanti**
TOYOTA COROLLA 1,3 H/B Skrás.: 17-01-95 Km.: 175.000 Prísur: 65.600,- (Sýnaður 06-01)
TOYOTA AVENSIS 2,0 TD Skrás.: 19-08-99 Km.: 111.000 Prísur: 148.600,- Garanti*
TOYOTA COROLLA 2,0 DIESEL Skrás.: 14-01-98 Km.: 131.000 Prísur: 105.600,- Garanti*
TOYOTA AVENSIS 2,0 TDI Skrás.: 29-04-99 Km.: 82.000 Prísur: 154.600,- Garanti*
OPEL ASTRA 1,7 DIESEL Skrás.: 31-03-94 Km.: 176.000 Prísur: 48.600,- (Sýnaður 02-01)
TOYOTA AVENSIS 1,8 TERRA Skrás.: 04-06-98 Km.: 46.000 Prísur: 144.600,- Garanti*
OPEL ASTRA 1,6 STW. Skrás.: 01-04-98 Km.: 82.000 Prísur: 95.600,- Garanti*
TOYOTA CARINA 1,6 L/B Skrás.: 08-04-97 Km.: 83.000 Prísur: 95.600,- Garanti*
OPEL ASTRA 1,7 TDI STW. Skrás.: 18-06-98 Km.: 135.000 Prísur: 87.600,- Garanti*
TOYOTA CARINA 1,6 XLI Skrás.: 12-06-96 Prísur: 89.600,- Garanti*
MAZDA 323 Skrás.: 23-10-95 Km.: 89.000 Prísur: 64.600,- (Sýnaður 06-01)
TOYOTA CARINA 1,6 L/B Skrás.: 10-04-96 Km.: 72.000 Prísur: 98.600,- Garanti* (Sýnaður 10-00)
CITROEN ZX Skrás.: 24-05-95 Km.: 57.000 Prísur: 64.600,- (Sýnaður 04-01)
TOYOTA CARINA 1,6 SED. Skrás.: 30-03-95 Km.: 53.000 Prísur: 89.600,- Garanti* (Sýnaður 09-01)
SUZUIKI ALTO 1.0 Skrás.: 21-09-98 Km.: 31.000 Prísur: 63.600,-
FORD SIERRA 1,8 DIESEL Skrás.: 28-11-91 Km.: 217.000 Prísur: 38.600,-

** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrsta skrásetingar dato.
* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. ver a seldir vi BRÚKTBILA-VÁTTAN

VØRUVOGNAR
MAZDA E 2200 4X4 VØRUVOGNUR Skrás.: 14-10-96 Km.: 69.000 Prísur: 79.600,- (S na ur 11-00)

STØKK INN Á GÓLVI
REYNI SERVICE
Opið: Mán.-fri. 8.00-17.00



Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040
Sosialurin - 311820